## Skrivstovunæmingur

Til skrivstovu okkara í Havn, søknast vit eftir einum skrivstovunæmingi at byrja umleið 2. januar 2007.

Vit kunnu bjóða eitt spennandi og fjølbroytt starv í einum góðum arbeiðsumhvørvi, har tú kemur at starvast við bókhald, tollavgreiðslu, telefonavgreiðslu og vanligar skrivstovuuppgávur.

Tað er ein treyt, at tú hevur FHS- ella HH-útbúgving.

Vit vænta, at tú ert røsk/raskur, fyrikomandi og hevur góðan teldukunnleika.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. des. 2006.

Eru spurningar ert tú altíð vælkomin at ringja á tel 309310 og tosa við Torbjørn Hansen, ella at støkka inn á gólvið.



demich

Stiðjagøta 2 · Postboks 378 · FO-100 Tórshavn · tel 30 93 10


# Hugnaløta í Viðarlundini í Havn

**Árligi jólahugnin hjá Lions Club Tórshavn verður nú sunnudagin. Pengarnir, sum koma inn, fara til góðgerandi endamál**

JÓLASØLA
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

1. sunnudag í advent kl. 14.00 – 16.30 verður árliga jólasølan hjá Lions.

Á hvørjum ári síðan1989 hevur verið møguligt hjá ungum sum eldri at hittast eina løtu í Viðarlundini seinnapartin 1. sunnudag í advent, har ið møguligt er at keypa tilfar til jólaprýði at pynta sínar egnu stovur við.

Er tað onkur, sum ikki hevur stundir at gera sínar egnu dekoratiónir heima við hús, er møguligt at keypa slíkar. Einar 60-70 verða til sølu sunnudagin.

Meðan lurtað verður eftir jólatónleiki frá limum í Havnar Hornorkestri kanst tú somuleiðis keypa tær ein drekkamunn og okkurt gott afturvið.

Jólamenninir vitja sum vera man, og teir hava okkurt í posanum til børnini, sum plaga at vitja í stórum tali hendan dagin.

Tá ið fyrsta tiltakið var av hesum slag, var Viðarlundin berlig. Hetta var árið eftir, at jólaódnin blásti alt um koll. Men so við og við eru trøini vaksin aftur, og hóast økið, har ið tiltakið fer fram, er ikki so ovurhonds stórt, so er hugnaligt, og tað er týðiligt at jólastemningurin er um at koma hjá bæði børnum og vaksnum.

Ágóðin av tiltakinum fer sum altíð til góðgerandi endamál.



*Mynd frá einari jólasølu hjá Lions*

*Mynd: www.lions.fo/torshavn*


J MICHAEL JACOBSEN




**Hjálp okkum at tøma handilin!**

**Allar vørur fyri ½ prís frá fríggjadegi 1. des.**

**Innbúgvið er eisini bíliga til sølu.**

HJÁ KAL Í KLAKSVÍK • TLF. 45 50 15

Búnýti • Gávulutir • Lingeri • Gardinur • Stelton



Lesið Sosialin - so eru tit við

